# skúlaeindir geva nógv fleiri fak-
# g námsfrøðiligar møguleikar

**Býtið millum land og kommunu**

*Føroya Lærarafelag saknar eina greiða útmelding um, hvat politisku flokkarnir vilja, tá ið tað snýr seg um býtið millum land og kommunu á skúlaøkinum. Ganga tit inn fyri 6-7 tvingaðum kommunalum økjum, og at hesi økini umsita fólkaskúlan fult og heilt?*

Sambandsflokkurin gongur inn fyri í mesta lagi 6-7 kommunueindum.

Tað er sjálvsagt ein fyrimunur, um kommunalu økini leggja saman sjálvboðin, men vit kunnu ikki bíða longur enn eitt vist. Tað ber illa til at leggja skúlan út til kommunurnar, fyrr enn kommunusamanleggingin er komin á mál.

Seinastu árini eru alt fleiri mál løgd út til kommunurnar at reka og røkja, og nú er stundin komin til fólkaskúlan! Tað at skúlin er umsitin av bæði kommunu og landi, hevur havt mangar tvørleikar við sær millum ár og dag. Tó eiga krøv at verða sett, so at trygd er fyri, at skúlin altíð verður raðfestur høgt av kommununum!

*Hvørja tíðaráseting seta tit á, at hetta skal verða framt?*

Skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 2010.

**Stórir og smáir skúlar**

*Í Føroyum eru 57 fólkaskúlar, nógvir teirra eru smáir. Hvør er tykkara støða til skúlastøddir?*

Skúlarnir í størru bygdunum eiga at varðveitast í tann mun tað er fakliga forsvarligt. Eisini eiga skúlar á útoyggj at hava lív lagað, so leingi børn eru har. Hinvegin, við broytta samferðslumynstrinum, so eiga vit at hugsa størri eindir fyri at fáa eina betri og fjølbroyttari undirvísing til næmingarnar. Størri eindir geva nógv fleiri møguleikar! Bæði fakliga og námsfrøðiliga! Viðvíkjandi vallærugreinum t.d., er tað ein stórur fyrimunur, um næmingatalið er hægri heldur enn lægri. Tað er bæði lætt og skjótt at ferðast í dag, og tí eiga vit í størst møguligan mun at leggja skúlar saman, so at mest fæst burturúr.

*Eftir hvørjum leisti eiga skúlar at verða samanlagdir?*

Sambandsflokkurin er fyri at leggja skúlar saman, men tað skal vera fyri at fáa ein betri skúla! Tað er neyðugt, at bæði lærarar, skúlamyndugleikar á staðnum og kommunalu myndugleikarnir í felag gera sær greitt, hvussu hetta verður skipað í teirra kommunu!

*Vilja tit stuðla kommunum í sambandi við bygging av nýggjum skúlum, ið eru úrslit av samanleggingum?*

Eyðvitað er, at neyðugt verður við nýggjum og størri skúlum, og tí má landið saman við kommunalu myndugleikunum finna eina loysn, sum er haldbar fyri báðar partar.

*Tá ið talan er um samanlegging – eru tit sinnað at varðveita verandi tímajáttan, hóast skúlar verða lagdir niður, hetta so at fleiri lærarar vera til t.d. yngru árgangirnar?* Tað ræður um, at skúlarnir fáa ta tímajáttan, ið tørvur er á!

*Ella hugsa tit samanlegging bara við sparing fyri eyga?*

Her verður fyrst og fremst hugsað um at fáa ein so góðan skúla sum møguligt. Ein samanlegging í størri eindir eigur at geva okkum ein betri skúla!

**Næmingar við serligum tørvi**

*Fólkaskúlalógin ásetir, at fólkaskúlin er fyri øll – sama hvønn tørv næmingurin hevur. Veruleikin er, at í fólkaskúlanum eru nógvir næmingar við serligum tørvi, sum ikki fáa nøktandi undirvísing. hvussu skipa vit fyri, at tey veiku í okkara skúla, atferðartruplir næmingar og onnur við serligum tørvi fáa eitt nøktandi skúlatilboð?*

Fyrst og fremst við nøktandi játtan! Tímajáttanin eigur at verða soleiðis skipað, at tann veiki næmingurin fær tann stuðul, hann hevur tørv á. Tað sama skal vera við teimum atferðartruplu. Í tí sambandi er neyðugt við serkunnleika á staðnum, soleiðis at tað ber til at fáa hjálp beinanvegin, tá ið brúk er fyri tí!




# og útbúgving størstu faktorarnir
# gja upp fyri sosialum ójavna

eina greiða útmelding um, hvat politisku flokkarnir vilja, tá ið tað snýr seg um býtið millum land og kommunu á skúlaøkinum.

*Ganga tit inn fyri 6-7 tvingaðum kommunalum økjum, og at hesi økini umsita fólkaskúlan fult og heilt?*

Vit ganga inn fyri størri kommunalum eindum. Sambært galdandi lóg skulu hesar vera skipaðar innan árslok 2009. Tá hetta er gjøgnumført, verður býtið ímillum land og kommunur sjálvsagt endurskoðað. Út frá verandi støðu eru vit ímóti, at kommunurnar yvirtaka ábyrgdina av undirvísingini í fólkaskúlanum. Hetta úr frá teirri hugsjón, at støðið í føroyska fólkaskúlanum eigur at vera so javnt sum gjørligt kring alt landið – eisini í teimum økjum, har kommunurnar eru verri fyri fíggjarliga og hava avmarkaða fyrisitingarliga megi. Skulu t.d. 7 stórkommunur yvirtaka ábyrgdina av fólkaskúlanum og møguliga øðrum økjum, krevur hetta eina kommunala útjavning ella møguliga ein blokkstuðul frá landinum til kommununar til at fyrisita hesi øki.

*Hvør er so besti bygnaðurin eftir tykkara tykki?*

Um kommunurnar ikki skulu hava ábyrgdina av fólkaskúlanum, eigur at verða umhugsað, at landið yvirtekur alla ábyrgd av fólkaskúlaøkinum, soleiðis at øll ábyrgd liggur á sama stað.

**Stórir og smáir skúlar**

*Í Føroyum eru 57 fólkaskúlar, nógvir teirra eru smáir. Hvør er tykkara støða til skúlastøddir?*

Javnaðarflokkurin skilir, at neyðugt er við smáum skúlum á útoyggjunum, soleiðis at tað er møguligt hjá familjum við børnum at búgva á útoyggj. Tá tað er sagt, heldur Javnaðarflokkurin at størri skúlar og skúlaøki geva møguleika fyri betri undirvísing og betri gagnnýtslu av ítøkiligu fakførleikunum hjá lærarunum, serliga tá hugsað verður um nýggju læraraútbúgvingina. At lærarar undirvísa í tí, sum teir eru sterkastir í, kemur sjálvsagt næmingunum til góða. Harumframt mennist næmingurin betur sosialt við at vera í einum størri skúlaumhvørvi.

*Eftir hvørjum leisti eiga skúlar at verða samanlagdir, um so er, at teir skulu tað?*

Í meginskúlar í komandi størri kommunalu økjunum. Verandi smáu skúlar kunnu tá nýtast til ávísar serfunktiónir á skúlaøkinum um neyðugt.

*Vilja tit stuðla kommunum í sambandi við bygging av nýggjum skúlum, ið eru úrslit av samanleggingum?*

Eins og svarað fyrr, taka vit undir við eini blokkstuðulsskipan á skúlaøkinum.

*Tá ið talan er um samanlegging – eru tit sinnað at varðveita verandi tímajáttan, hóast skúlar verða lagdir niður, hetta so at fleiri lærarar vera til t.d. yngru árgangirnar?*

Ja, vit eru sinnað at varðveita verandi tímajáttan. Men eru av teirri áskoðan, at hetta kann nýtast at menna byrjanarundirvísingina og at stuðla veikum næmingum. Tímajáttanin kann nýtast fleksibult, t.d. til tvílæraraskipan í byrjanarundirvísingini.

*Ella hugsa tit samanlegging bara við sparing fyri eyga?*

Nei, á ongan hátt. Javnaðarflokkurin sær skúla og útbúgving sum størstu faktorarnar at byrgja upp fyri sosialum ójavna í samfelagnum. Vit eru sannførd um, at útbúgving av einum og hvørjum slag er størsta tilfeingi fyri framtíðar menningina av Føroyum.

**Næmingar við serligum tørvi**

*Fólkaskúlalógin ásetir, at fólkaskúlin er fyri øll – sama hvønn tørv næmingurin hevur. Veruleikin er, at í fólkaskúlanum eru nógvir næmingar við serligum tørvi, sum ikki fáa nøktandi undirvísing. Hvussu skipa vit fyri, at tey veiku í okkara skúla, atferðartruplir næmingar og onnur við serligum tørvi fáa eitt nøktandi skúlatilboð?*

Við sernámsfrøðiligari ráðgeving úti í økjunum og við fleksiblari tímajáttan, ið ger tað møguligt hjá fleiri lærarum at undirvísa í sama flokki.

*Eiga næmingar at verða býttir upp eftir førleika, evnum, atferð ella øðrum?*

Javnaðarflokkurin er generelt ímóti at býta fólk upp í bólkar eftir evnum, førleikum og øðrum. Vit ásanna, at fólkaskúlin er ein av grundsúlunum undir samanhangskraftini í samfelagnum. Verða næmingarnir í fólkaskúlanum býttir sundur, er størri møguleiki fyri, at vit fáa eitt sundurbýtt samfelag, har hvør einstakur bert hugsar um seg sjálvan.

*Um ja, hvat fyri tilboð eiga teir at fáa? ella eigur skúlin at halda fast við verandi skipan, har næmingar ikki verða flokkaðir eftir fakligum evnum, atferð o.ø?*

Tað eigur sjálvsagt at bera til at bólka næmingar upp í serligar lesibólkar og annað eftir førleika ein minni part av tíðini. Men floksskipanin eigur altíð at vera grundsúlan í undirvísingini.

*Um ja, hvussu tryggja vit so, at allir næmingar fáa eitt nøktandi tilboð?*

Við fleksiblari tímajáttan og harvið við møguleika fyri fleiri undirvísarum í sama flokki. Tó er tilveran soleiðis, at tað altíð kemur fyri, at næmingar eru so mikið veikir, at teir ikki vera við í vanligu undirvísingini og luttaka í einum vanligum skúlaflokki. Tá mugu onnur serlig atlit takast. Her hugsa vit um serskúlar og serflokkar. Men hetta skal sjálvsagt bert vera galdandi í serliga serligum førum.